

# Oggi og Beinta í Grafiska Verkstaðnum

**Verkstaðnum í Søldarfirði Oggi Lamhauge og Beinta Hansen, sum baði eru úr Søldarfirð, sýna fram í Grafiska Verkstaðnum í Søldarfirði í Mentanarvikuni í Runavík**

Verkstaðurin heldur til í gamla handlinum hjá Lenu og Sámal Jákup Lamhauge og hevur verið karmur um virksemi hjá Oggi Lamhauge síðan 2006. Verkstaðurin, sum er góðar 60 fermetrar til støddar, er útgjørdur við steinprent og koparprent pressum. Eisini er eitt stórt alrúm, sum kann nýtast til framsýningar og undirvísingarhøli v.m. Eisini hevur verkstaðurin verið nýttur til onkra framsýning hjá listamanninum saman við øðrum.

**Beinta Hansen**

Hesaferð verður tað Beinta Hansen gestur á verkstaðnum. Hon hevur verið virkin á listarliga økinum í nøkur ár. Hon er sjálvlærd, men hevur gingið til grafikk í Tórshavnar Listaskúla, sum er kvøldskúlin hjá Tórshavnar Kommunu. Hon er ikki heilt nýggj í framsýningar høpi og hevur áður sýnt fram á mentanarvikum. Annars er Beinta nýliga útbúgvin sum sjúkrarøktarfrøðingur. Beinta kemur vantandi at brúka verkstaðin nakað, komandi tíðina.

**Oggi Lamhauge**

Oggi hevur verið virkin á listarliga økinum, her á landið og útlendis, síðan hann gjørdist liðugur við útbúgving sína sum listgrafikari við lærda háskúlan í Íslandi, árið 1997. Kendasta verk hansara er uttan iva altartalvan í Hattarvíkar kirkju, sum varð latin kirkjuni í 2001. Oggi hevur eisini gjørt hópin av serprentum fyri stovnar og virki og undirvíst bæði børnum, ungum, vaksnum og menningartarnað í tekning, máling og grafikki. Oggi fekk trý ára starvsløn frá Mentanargrunni Landsins, frá apríl mánað 2006. Oggi arbeiðir við samtíðar list við trúarligum symbolum.

Listaframsýningin er opin soleiðis: hósdag, fríggjadag, leygardag og sunnudag frá 18.00 til 20.00. Hóskvøldið verður fernisering, har tónleikur við Hans Jacob Kollslíð og Kára Sverrisyni verður at hoyra.

# Tað gamla húsið

**Listaframsýning í Mentanarvikuni í Runavík**

Tað gamla húsið, er heitið á listaframsýningini, sum verður á býráðsalinum hjá Runavíkar kommunu í Mentanarvikuni, 18. – 25. oktober.

Á framsýningini fevnir m.a. um fotomyndir og grafiskt prent. Myndirnar, ið vera at síggja, eru eitt sindur ørðvísi. Hetta merkir, at í staðin fyri at taka eina flotta mynd í tí vøkru náttúruni vit hava, velur Sunrid heldur at finna mótsetningar. Eitt ikki so vakurt gamalt hús, kann síggja flott út í vakrari náttúru. Tá tað snýr seg um grafiska partin, brúkar Sunrid hús og bygningar. Hon fær íblástur frá bygningum úr stórbýum, eitt nú russiskum byggihátti umframt gomlum føroyskum húsum.

Sunrid í Gong er 29 ára gomul, hon er útbúgvin fotografur og starvast dagliga í hesum yrkinum. Hon hevur atelier í Saltangará, har hon hevur nógvar ymiskar uppgávur, men tekur sær nógv av portret fotograferingum.

Framsýningin er opin allar dagar í Mentanarvikuni frá kl 15.00 til 18.00.



# Listaframsýning við Edith Mørkøre í skúlanum við Løkin



Í samband við Mentanarvikuna í Runavík, 18. - 25. oktober, verður listaframsýning við Edith Mørkøre í skúlanum við Løkin. Við á framsýningini í eru hennara nýggjastu málningar. Framsýningin byrjar sunnudagin 18. oktober kl 16.00. Øll eru hjartaliga vælkomin!

Edith málar út frá menniskjaligum virðum og á framsýningini í Runavík verður abstrakt/ekspresionistiskt list at síggja. Íblásturin til málningarnar hevur hon út frá viðurskiftum, sum rørast í tí dagliga lívinum og hendingum, sum hon ella onnur rundan um hana koma út fyri.



Edith Mørkøre er født í 1979, er ættað av Argjum, gift við Kristoffur Mørkøre úr Klaksvík og er búsitandi Inni á gøtu í Hoyvík. Edith arbeiðir við listinu sum sítt høvuðsstarv. Hon hevur málað, síðan hon var tannáringur og hevur gingið á Háskúla í Rønde í Danmark, har hon tók sergrein í list. Edith hevur verið við á nógvum ymiskum framsýningum. Hon hevur m.a. sýnt fram í Smiðjuni í Lítluvík (Tórshavn), Ribarhús (Fuglafjørður), Lions (Runavík), Lions (Tórshavn), Norðoyarstevnuframsýningini (Klaksvík), Hotel Hafnia (Tórshavn), Kelduni (Skálabotnur), Gallarí Jinx, (Tórshavn), SMS (Tórshavn), Eik bank (Tórshavn), Gamli handilin á Heiðunum (Runavík), Snarskivuni (Tórshavn), Gallari Oyggini (Tvøroyri), Københavns Kulturcenter (KBH), Savni á Myru (Hov), Lauritz (Kolding) og Luritz (Odense).

Framsýningin verður opin soleiðis: Sunnudag, mánadag og týsdag frá 16.00 til 20.00, mikudag frá 17.00 – 19.00, hósdag frá 16.00 – 19.00, fríggjadag, leygardag og sunnudag frá 16.00 – 20.00



# Marjun M. Berg listaframsýning í Orkis

Listaframsýning verður í Orkis í Mentanarvikuni. Tað er listarkvinnan Marjun M. Berg, sum sýnir fram áseymaðar myndir og akrylmálningar í Orkis á Glyvrum. Marjun hevur í fleiri ár fingist við at mála, og tey síðstu árini eisini við at seyma myndir. Hon hevur verið við á framsýningun hjá Lions í Runavík og Havn, eisini hevur hon áður havt framsýning í Orkis á Glyvrum og Sense í Runavík.

Marjun hevur fingið frálæru frá Sámal Toftenæs, Arcibald Black, Hilmar Højgaard og Børge Møller. Innan myndaseyming hevur hon fingið frálæru frá Evu Andersen og Solveig Refslund.

Framsýningin verður alla mentanarvikuna, og hevur somu upplatingartíðir sum Orkis.